# Jólabryggj vunnið ølsmakking í Danmark

**Farna mánadag skipaði Selskab for Vestjysk Ølkultur fyri ølsmakking av jólabrygginum, sum nú aftur er komið á marknaðin, og Jólabryggi hjá Føroya Bjór vann**




**ØL-SMAKKING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kappingin varð skipað í tveimum bólkum. Veikara slagið av jólabryggj var í einum, og sterkara slagið var í hinum. Í Føroyum er ikki loyvt at bryggja øl, sum er sterkari enn 5,8 prosent, og tí var Jólabryggi hjá Føroya Bjór í bólki við tí veikara slagnum.

Níggju øl vóru í hesum bólki, og talan var um blindsmakking. Mett varð um lukt, útsjónd, smakk, skúm og tí sum hartil hoyrir, og tá samanum kom vann ølin hjá Føroya Bjór henda bólkin.

Kappingina hjá ølinum í sterkara flokkinum vann Bryggeriet Vestfyn við ølini Willemoes Jule Ale.

Henda ølin vann eisini samlaðu kappingina, har Jólabryggið hjá Føroya Bjór fekk annað pláss.

# Bárður Nielsen skilir ikki Astrup

**Bárður Nielsen skilir ikki hví Jørn Astrup Hansen kemur við atfinningunum nú. Hann vísir til Bústaðarpakkan, sum kemur komandi vár og sum loysir trupulleikarnar Jørn Astrup Hansen nevnir**



*Bárður Nielsen, landsstýrismaður*

**BÚSTAÐAR-TRUPULLEIKIN**
*Rólant Waag Dam*

- Øll verða ikki viðfarin á líka. Skattareglurnar favorisera ognarbústaðin fram um leigubústaðin. Um leigubústaðurin skal hava nakra framtíð í Føroyum, so krevur hetta broytta skattalóg, hevur Jørn Astrup Hansen, formaður í Búskaparráðnum, sagt í skrivi til bløðini.

Men Bárður Nielsen, landsstýrismaður í Fíggjarmálum, skilir ikki heilt, hví Jørn Astrup Hansen, formaður í Búskaparráðnum, kemur fram við atfinningum mótvegis bústaðarpolitikkinum júst nú.

– Eg má siga sum er, at eg skilji ikki, hví hann kemur við hasum júst nú. Formaðurin í Búskaparráðnum má vera greiður um, at Bústaðarpakkin kemur komandi vár, og hann loysir trupulleikarnar, sum Jørn Astrup Hansen tekur fram, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í Fíggjarmálum.

Bústaðarpakkin, Bárður Nielsen nevnir, ger, at MVG og rentustuðul til íbúðir til leigu verður javnsettur í mun til sethús.

Bárður Nielsen vísir á, at tað Jørn Astrup Hansen er inni á, er ein donsk loysn, men at Bústaðarpakkin er ein føroysk loysn, sum loysir trupulleikarnar, búskaparráðsstjórin er inni á á ein annan hátt, ið eisini er umsitingarliga lættari.

Útsagnirnar hjá Bárði Nielsen eru viðmerking til lesarabræv hjá Jørn Astrup Hansen, sum er at lesa á síðu 10 í dagsins blað.

Vit, fólkið í Føroyum...

Stjórnarskipanarnevndin arbeiðir við at smíða nýggja føroyska stjórnarskipan. Grundarlagið undir hesum arbeiði er frágreiðing frá gomlu Grundlógarnevndini og Fyrra flaggdagsálit frá 2004. Í Stjórnarskipanarnevndini eru politikarar og serfrøðingar. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til stjórnarskipan í seinasta lagi 31. desember í ár.

## Almennur kunningarfundur um nýggja føroyska stjórnarskipan

í auluni í skúlanum á Giljanesi týskvøldið 21. november kl. 19.30

Stjórnarskipanarnevndin skipar í hesum døgum fyri almennum kunningarfundum kring landið.
**Týskvøldið 21. november kl. 19.30 verður kunnandi fundur í auluni í skúlanum á Giljanesi.**
Kunnað verður um arbeiðið at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Høvi verður at seta spurningar og at ogna sær ókeypis tilfar frá Stjórnarskipanarnevndini.
Meira fæst at vita á heimasíðuni hjá nevndini á www.ssn.fo

Stjórnarskipanarnevndin
*Faroese Constitutional Committee*

J. C. Svabos gøta 14 · 100 Tórshavn · ssn@ssn.fo · www.ssn.fo

SOZO 522335